## Sunset byrjar aftur

Kappingin í Sunset-deildini í hondbólti hevur ligið still, meðan kvinnulandsliðið hevur spælt í Sheffield, men í annað kvøld verður aftur lagt fyri. Dystirnir eru tá tveir í tali. Á Skála kemur VB á vitjan hjá StÍF, og í Havn verður dystur millum Kyndil og Tjaldur.



## Gleða seg til Sylla

Fyri góðum tveimum mánaðum síðan gjørdi Amed Davy Sylla, sum áður hevur roynt seg í ÍF og B36, avtalu við Toda Jónsson og FC Amager. Framherjin hevur líka síðan bíða eftir neyðugu pappírunum, og av somu orsøk hevur hann framvegis sín fyrsta dyst fyri felagið til góðar. Nakað, sum venjarin Michael Madsen er argur um. - Tað harmar meg, at vit skulu bíða so leingi – hann er komin higar við konu og tveimum børnum, og tað er synd, at hann bara sleppur at venja. Hann er í góðari venjari, og eg gleði meg til at síggja hann í dysti, sigur Michael Madsen við Amagerbladet.

# Jógvan Martin vil víðari

**Jógvan Martin Olsen hevur ætlanir um at venja útlendskt felag**



*Jógvan Martin Olsen verður venjari hjá Víkingi tey bæði næstu árini*

FÓTBÓLTUR

*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Eg havi verið í sambandi við fleiri feløg, men eg kann ikki staðfesta fyri tær, um feløgini hava verið donsk.

Komandi tvey árini fer venjarin hjá Víkingi ætlandi at eita Jógvan Martin Olsen. Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin og samansetta felagið gjørdi avtalu í farnu viku, og toftamaðurin fer nú at hugsa um uppgávuna at vinna gøtufólk og leirvíkingar í altjóða fótbólt. Men tað verður kanska eisini seinasta føroyska uppgávan hjá Jógvani Martin Olsen á hesum sinni.

- Ætlanin er at royna venjaraevnini í útlandinum. Tað er framtíðarætlanin. Eg havi einki ynski um eitt serstakt land, so eg er opin fyri øllum møguleikum, sigur Jógvan Martin Olsen við bold.dk.

Komandi venjarin hjá Víkingi fer í desember undir Pro-Licence venjaraútbúgvingina, sum er hin hægsta hjá UEFA.

# ÍF Føroyar liggur til niðurflyting

**Tað sær ógvuliga svart út hjá ÍF Føroyum í Seriu 1, sum nú ikki longur einsamalt kann avgera lagnu sína í deildini**

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað byrjaði annars væl, tá ÍF Føroyar spældi dyst ímóti Bk. Viktoria um vikuskiftið. Palli Augustinussen legði útisetarnar á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Men so megnaði ÍF Føroyar ikki at skapa stórt meira.

Góða spælið teir vístu fyrstu løtuna gloymdu teir burtur, og lótu teir Viktoria sleppa inn í dystin. Heimamenninir í Fælledparken trýstu støðugt føroysku leikararnar, og eitt korter fyri leiklok bragdaði hjá teimum. Tvey mál innanfyri eina lítla løtu var nóg mikið at punktera ÍF Føroyar, sum ikki megnaði at svara aftur.

Tapið kemur ógvuliga dátt við. Nú kann ÍF Føroyar ikki longur avgera lagnu sína sjálvt. Sum støðan er í løtuni, flyta fimm lið niður í Seriu 2. Og á einum tíggjunda plássi er liðið undir niðurflytingarmarkinum – trý stig aftanfyri Rødovre.

Tað merkir, at ÍF Føroyar skal vinna á Tårnby, samstundis sum Viktoria skal vinna á Rødovre í ársins seinasta leikumfari, um ÍF Føroyar skal hava eitt lið í Seriu 1 komandi kappingarár.

# Ronaldo og sjey spaniólar

**Eingin ivi er um, at Cristiano Ronaldo er stórfavorittur at vinna gylta bóltin hjá France Football. 30 spælarar eru á nomineringslistanum – av hesum sjey spaniólar**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Cristiano Ronaldo er uttan iva stórfavorittur at gerast fremstur, tá ítróttartíðindafólk kring Europa greiða atkvøðu um at kjósa ársins fótbóltsspælara í 2008*

So hvørt sum enn eitt ársskifti nærkast, nærkast eisini tíðin, tá bestu fótbóltsspælararnir í 2008 skulu kjósast.

Ein tann mest virda atkvøðugreiðslan av øllum er gylti bólturin hjá France Football, har ítróttartíðindafólk úr Europa kjósa besta spælaran í europisku kappingunum farnaárið. Áður varð atkvøðugreiðslan avmarkað til bert at fevna um europiskar spælarar, men seinnu árini hevur kravið bert verið, at spælarin spælir í onkrari av europisku ligunum.

### Ronaldo ovast

Tá tosað verður um móttakara av gylta bóltinum í ár, so er eingin ivi um, at Cristiano Ronaldo úr Manchester United er stórfavorittur til heitið. Hóast byrjanin upp á nýggja kappingarárið hevur verið tarnað av skaða, so vóru avrikini undan hesum av slíkum slag, at hann dróg yvirskriftir um allan heim. Og ikki bert fyri møguliga metskiftið til Real Madrid.

Í Onglandi hevur hann longu vunnið tað, sum vinnast kann, og í Europa hevur hann skógvin fyri mongu mál síni í seinasta kappingarári. Og nú bíða tey flestu so bara eftir, at hann eisini fær gyltu bóltarnar frá bæði France Football og í FIFA-atkvøðugreiðsluni, har landsliðsvenjarar kring allan heim greiða atkvøðu.

### EM-heitið vigar nógv

Tá móttakarin av gylta bóltinum skal finnast, verður ofta hugt eftir, hvørjum spælararnir hava rokkið við feløgum ella landsliðum sínum.

Ikki minst telur landsliðið nógv, tá endaspæl er á skránni, og 2008 er einki undantak í so máta. Sponsku europameistararnir hava nevnliga sjey mans á listanum, og er hetta nógv meira, enn nakað av hinum londunum hevur.

Eisini er vert at bíta merki í, at tað serliga eru spælarar, sum gera um seg í ensku Premier League og sponsku La Primera, sum eru á listanum. Ikki færri enn 22 av spælarunum á listanum koma úr heusm báðum deildunum. Og bara tríggir eru úr italsku Seriu A, sum annars plagar at telja heilt nógvar kandidatar til gyltu kúluna.

**Fótbóltur**

**1. deild**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 07 Vestur | 26 | 20 | - | 2 | - | 4 | 108 | 33 | 75 | 62 |
| 2 | AB | 26 | 20 | - | 1 | - | 5 | 96 | 32 | 64 | 61 |
| 3 | VB/S | 26 | 18 | - | 2 | - | 6 | 59 | 27 | 32 | 56 |
| 4 | TB | 26 | 16 | - | 4 | - | 6 | 62 | 22 | 40 | 52 |
| 5 | Víkingur | 26 | 9 | - | 3 | - | 14 | 34 | 70 | -36 | 30 |
| 6 | B68 | 26 | 7 | - | 4 | - | 15 | 49 | 63 | -14 | 25 |
| 7 | HB | 26 | 5 | - | 9 | - | 12 | 29 | 51 | -22 | 24 |
| 8 | NSÍ | 26 | 6 | - | 5 | - | 15 | 46 | 72 | -26 | 23 |
| 9 | EB/S | 26 | 6 | - | 2 | - | 18 | 27 | 87 | -60 | 20 |
| 10 | KÍ | 26 | 5 | - | 4 | - | 17 | 33 | 86 | -53 | 19 |

**Hondbóltur**

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 109 | 96 | 13 | 8 |
| 2 | Neistin | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 127 | 115 | 12 | 6 |
| 3 | StÍF | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 89 | 83 | 6 | 5 |
| 4 | H71 | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 113 | 100 | 13 | 4 |
| 5 | Kyndil | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 89 | 113 | -24 | 1 |
| 6 | KÍF | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 91 | 111 | -20 | 0 |

### FAKTA

**Teir 30 bestu**

Emmanuel Adebayor (Arsenal), Togo
Sergio Agüero (Atletico Madrid), Argentina
Andrei Archavine (Zénith Saint-Pétersbourg), Russland
Michael Ballack (Chelsea), Týskland
Karim Benzema (Lyon), Frakland
Gianluigi Buffon (Juventus), Italia
Iker Casillas (Real Madrid), Spania
Cristiano Ronaldo (Manchester United), Portugal
Didier Drogba (Chelsea), Fílabeinsstrondin
Samuel Eto'o (FC Barcelona), Cameroun
Cesc Fabregas (Arsenal), Spania
Fernando Torres (Liverpool FC), Spania
Steven Gerrard (Liverpool FC), Ongland
Zlatan Ibrahimovic (Inter Milan), Svøríki
Kaka (Milan AC), Brasil
Frank Lampard (Chelsea), Ongland
Lionel Messi (FC Barcelona), Argentina
Pepe (Real Madrid), Portugal
Franck Ribéry (Bayern München), Frakland
Wayne Rooney (Manchester United), Ongland
Marcos Senna (Villarreal), Spania
Sergio Ramos (Real Madrid), Spania
Luca Toni (Bayern München), Italia
Edwin Van der Sar (Manchester United), Holland
Rafael Van der Vaart (Hambourg SV/Real Madrid), Holland
Ruud Van Nistelrooy (Real Madrid), Holland
Nemanja Vidic (Manchester United), Serbia
David Villa (Valencia CF ), Spania
Xavi (FC Barcelona), Spania
Youri Zhirkov (CSKA Moskva), Russland